Ljómandi Kuldabrúgv:

# Glógvandi tónlist úr útnorðri

**Norðuratlants Bryggjan var herfyri karmur um ein festival, har nøkur av fremstu tónlistafólkunum úr útnorðri innan singer/songwriter stílin sýndu sínar dygdir.**

UMMÆLI
Petur W. Háberg

HÓSKVØLD:

## Einsljóðandi skrá

Sum ein grønur og óroyndur blaðmaður á síni fyrstu missón sat undirritaði klárur við blokki og penni longu hálvan tíma, áðrenn hol skuldi setast á Ljómandi Kuldabrúnna. Tíggju spennandi nøvn úr útnorðri og Danmark skuldu í tríggjar dagar framføra sín tónleik á Norðuratlants Bryggjuni.

Hølini á ovastu hædd á Bryggjuni, sum nýliga vórðu sett í stand, egnaðu seg sera væl sum karmur um tiltakið. Gamla pakkhúsið frá 1700-talinum klæddi væl nýggju andlitslyftingina, sum sera hóskandi hevði latið nógv av gamla bygninginum verið eftir. Gamalt og nýtt flættað snøgt saman í eina væleydnaða eind.

### GAMLIR SANGIR ÚR HJARTANUM

Hetta, og mangt annað, fekk ein tíð at hugsa um, meðan ein sat og bíðaði. Ein tíma og tveir kaffikoppar seinni kundi Dennis Mejdal, sum hevði tvífalda leiklutin sum vertur og framførari, bjóðað teimum umleið 100 áhoyrarunum vælkomnum til Ljómandi Kuldabrúnna.

Eftir eina stutta framløgu av skránni byrjaði hann sína framførslu, gittarin og hann tveireinir. Góðir sangir og fangandi melodiir eyðkendu hansara tónleik, og hetta skuldi vísa seg at vera gjøgnumgangandi fyri alt kvøldið.

Hann spældi seks sjálvskrivað løg, sum hann eisini sang sera væl. Viðhvørt leiddi hann tankarnar til Chris Cornell, sum er kendur úr Soundgarden og Audioslave. Hann sang púra reint og hevði fullkomið tamarhald á røddini.

### INNILIGUR ANGU

Aftaná hann kom eitt av nøvnunum, sum uttan iva mong saman við mær høvdu glett seg til at hoyra. Angu kom á pall og byrjaði at spæla sín vakra og inniliga tónleik. Sera sterk og vælskrivað løg, sum vórðu eins væl sungin.

Ungi grønlendingurin greiddi frá, at síðani hann flutti til Keypmannahavnar fyri at liva av tónleikinum, var hann farin frá at skriva beint úr hjartanum til at skriva tónleik, sum hann væntaði fór at tekkjast øðrum. Men hetta kvøldið hevði hann valt at framføra gomul løg, sum vóru skrivað, meðan hann enn búði í Grønlandi.

Sum sagt, so vóru hetta góð løg, og tá ið ein hugsaði um heitið 'grønlendski Teitur', ið hann fekk, tá ið hann vitjaði Føroyar fyri tíð síðani, so kundi tú ikki annað enn nikka játtandi.

Men meðan Teitur hevur serlig evni at fáa samband við áhoyraran og draga hann við inn í sínar framførslur, so var Angu ikki sørt svinnur og afturhaldin. Áskoðarin gjørdist ongantíð meiri enn akkurát tað; ein áskoðari.

### LÍVLIGIR TÓNAR

Harafturímóti var talan um ein sera vælupplagdan og lívligan Høgna Lisberg, sum eftir steðgin átti tørn. Bæði Mejdal og Angu høvdu sitið niðri undir sínari framførslu, og hetta var eisini hóskandi til teirra tónleik. Men Høgni stóð uppi og hevði, umframt gittaran, munnharpuna við, sum hann eisini spældi yvirraskandi væl á. Uttan mun til um hann spælir við ella uttan bólkin hjá sær, so verður spælt við innliving.

"Morning Dew" og aðrir ljómaðu, og í mun til onkra aðru ferð, hann hevur framført, dugdi hann hetta várkvøld væl at práta við áhoyrararnar og greiða frá.

Síðst á skránni var Pétur Ben, ið eisini verður eitt av nøvnunum á ársins G!festivali. Pétur Ben er best kendur úr bólkinum hjá Mugison, ið var eitt av nøvnunum á G!-festivalinum í fjør.

At Pétur Ben hevði framført fyrr, var sjónligt. Íslendingurin dugdi væl at fáa fólkið við og prátaði enntá við áhoyrararnar. Í mun til hinar báðar fyrru, sum báðir spældu stillisliga og róliga á gittaran, spældi Pétur (eins og Høgni)



Talan var um ein sera væl upplagdan Høgna Lisberg, sum framførdi á Norðurbryggjuni
mynd: a Jóanesarson



FAKTA

**Tónleikainnrás07**

Í samstarvi við danska plátu- og bookingfelagið Artiscope skipar Norðuratlants Bryggjan fyri fleiri smáum festivalum í ár, ið hava fingið felagsheitið Tónleikainnrás07. Endamálið er at bróta landamørk og varpa ljós á tónleik úr útnorðri. Ljómandi Kuldabrúgv er annar festivalurin í røðini. Fyrsti festivalurin var Isslag, har m.a. føroyski Thor Simonsen luttók. Tónleikastílar á komandi festivalum verða m.a. elektronika og tungmálmur.